Fíggjarmálaráðið

Lønardeildin

# Avtala um ólagaligar arbeiðstíðir á Veðurstovuni

Tá starvsfólk á Veðurstovuni verða áløgd at arbeiða ólagaligar arbeiðstíðir í sambandi við veðurvaktir er fylgjandi avtala gjørd um samsýningar.

1. Ótíðargjald verður latið í sambandi við, at arbeitt verður ólagalig tíðarskeið, og kann latast mánadag til fríggjadag millum kl. 17 - 07, og frá fríggjadegnum kl. 17 til mánamorgun kl. 7, tá arbeitt verður í hesum tíðarbilunum. Ótíðargjaldið kann annaðhvørt útgjaldast saman við mánaðarlønini ella umroknast til avspáking.

2. Mánadag til fríggjadag millum kl. 17.00 – 07.00 verður um tíman latið eitt ótíðargjald svarandi til 16 % av stig 1 í lønartalvuni hjá kandidatum.

Frá fríggjadag kl. 17.00 til mánamorgun kl. 07.00 verður um tíman latið eitt ótíðargjald svarandi til 31 % av stig 1 í lønartalvuni hjá kandidatum.

3. Avtalan er galdandi frá tí degi semjan verður undirskrivað, og er galdandi fram til 1. oktober 2025, tá avtalan verður endurskoðað í mun til tørvin á Veðurstovuni.

Tinganes 24. november 2023

______________________________

Ruth Vang, Landsstýriskvinna í Fíggjarmálum

______________________________

Páll Nolsøe, formaður í AKF

______________________________

Jan Mortensen, Lønarstjóri